# Hvat gera vit við happing í Eysturskúlanum?



**Tað er ein mannarættur hjá øllum børnum í einum fólkaræðisligum samfelag at kenna seg trygg í skúlanum. Skúlin eigur heilt greitt at vísa, at her á staðnum finna vit okkum ikki í, at ágangur verður framdur móti næmingum og lærarum.**

# Formæli

Tað er staðfest, at happing millum skúlanæmingar kann hava álvarsamar avleiðingar fyri tann einstaka næmingin. Avleiðingar fyri umstøður hansara og rættin at læra í einum tryggum umhvørvi.
Seinastu mongu árini hevur fyribrigdið happing verið nógv frammi bæði her hjá okkum og í londunum kring okkum. Nógv hevur verið tosað um, og stór orka hevur verið løgd í at granska henda trupulleika.
Í londunum kring okkum hava kanningar víst, at happing er rættiliga vanligt millum skúlanæmingar, og tí verður stór orka løgd í til tess at fyribyrgja hesum trupulleika. Smærri kanningar her heima í Føroyum benda á, at støðan hesum viðvíkjandi er ikki stórt øðrvísi hjá okkum enn í okkara grannalondum.

Ein arbeiðsbólkur varð av Mentamálaráðnum settur at kanna hesi viðurskifti og koma við tilmæli um tiltøk, hvat ítøkiligt kann gerast fyri at tálma happingini í fólkaskúlanum.
Eitt av tilmælunum hjá arbeiðsbólkinum er, at allir skúlar skulu gera eina trivnaðarætlan.
Í trivnaðarætlanini skal verða ítøkiliga lýst, hvussu skúlin arbeiðir við happing. T.d. eina atgerðarætlan, sum gjølla lýsir, hvat skúlin ger, tá ið happing tekur seg upp. Ítøkilig tiltøk, ein neyv frágreiðing um, hvussu farið verður til verka, hvørji tiltøk verða sett í verk fyri at fyribyrgja happing, og at fylgja happingarátøkunum upp, bæði tá ið talan er um átroðkandi trupulleikar og langtíðarætlanir.

Í august 2007 gjørdi leiðsla Eystursskúlans av, at ein slík ætlan skuldi gerast fyri Eystursskúlan, Ein arbeiðsbólkur varð settur, og avrikið, ið tú nú situr við, er úrslitið av arbeiðnum hjá arbeiðsbólkinum.

Vert er at leggja sær í geyma, at hetta er ikki ein endalig loysn á trupulleikunum, ið standast av happing, (so langt ífrá) men bóklingurin er vónandi ein vegleiðing fyri lærarar, hvussu farast *kann* fram.
Okkara avrik byggir á royndir hjá Cand.pæd.psyk. og lærara Helle Høiby. Helle Høiby hevur í mong ár arbeitt við børnum og trivnaði. Hon hevur undirvíst lærarum, skúlaleiðslum og øðrum. Vit trý, ið mannað hava arbeiðsbólkin, hava øll verið á skeiðum, sum Helle Høiby hevur hildið í Føroyum, og sum MMR hevur skipað fyri.

Við vón um góðan trivnað millum næmingar og lærarar.

Rúni Juul, Petry Hádal Johansen og Eyðna Magnussen

# Happing og arging

**Nær er tað happing, og nær er tað arging?**

Hesin spurningurin verður ofta havdur á lofti. Fyri at svara, er neyðugt at lýsa hugtøkini happing og arging – men ikki minst at lýsa tað, sum liggur ímillum hesi bæði hugtøkini.

# Hvat er happing?

Happing er, tá ið onkur, ímóti sínum vilja, ferð eftir ferð í eitt ávíst tíðarskeið, er offur fyri ágangi frá einum øðrum ella frá fleiri persónum. Ójavnvág er í millum hesar báðar partarnar. Annar er sterkari enn hin. Tann, ið ágangur verður framdur ímóti, hevur ilt við at svara fyri seg og stendur ofta hjálparleysur framman fyri tí ella teimum, sum fremja ágangin.

**Beinleiðis happing kann vera:** gerðir saman við hóttanum, óunnilig og særandi orð bæði beinleiðis ella umvegis SMS-boð ella kjattsíður.
Happing kann eisini vera: harðskapur, t.d. eitt skump, eitt slag, eitt spark ella at verða hildin fast uttan at vilja tað.
Men happing kann eisini verða, at tað verður flent at einum, at verða hildin uttanfyri felagsskapin ella bólkin, sum viðkomandi vil hava samband við.
Gerðir uttan orð, m.a. herming og ljótt kropsmál og niðurgerandi umtala. Hetta slagið av happing verður eisini nevnt **óbeinleiðis happing**.
At verða hildin uttanfyri felagsskapin er sostatt eisini happing, verður tað gjørt umaftur og umaftur í ávíst tíðarskeið.
Júst hesin óbeinleiðis hátturin at happa, er ringur at fáa eyga á, og eiga vit tí at leggja okkum eftir at gáa um hetta. Hetta sæst ikki so væl, men ger líka stóran skaða, sum beinleiðis happingin. Tað barnið, sum verður hildið uttanfyri vinarlagið í einum skúlaflokki, hevur stórar trupulleikar.

"Í ávís tíðarskeið" kann snúgva seg um fleiri ár, um vit lata standa til. Royndir siga, at fyri nógvar skúlanæmingar hevur talan verið um, at tey eru vorðin happað stóran part av skúlatíðini.

**Fakta: tað er ikki talan um happing, tá ið tveir javnbjóðis partar – fysiskt ella psykist – bresta saman ella berjast.**
**Happing er ikki ein samanbrestur – happing er ágangur.**

Ein persónur verður happaður ella er fyri ágangi av øðrum, tá ið hann ella hon áhaldandi og í eitt ávíst tíðarskeið er fyri negativum gerðum framdum av einum ella fleiri øðrum persónum.
Ein ávís ójavnvág er í styrkismuninum millum tann, sum happar og tann, sum verður happaður.
Tann, ið er fyri negativu gerðunum, hevur trupult við at verja seg og er oftast næstan hjálparleysur í mun til tann ella tey, ið plága hann ella hana.

## Hvat er arging?

At arga er: fáa øði í, gera onkran illan, erta, øsa onkran upp, tá at ein sjálvur heldur, at tað er stuttligt.
Flest øllum børnum/ungum dáma ikki, at verða argað. Bara, um tað ikki er so illa meint, at tað verður gjørt við einum góðsligum tónalagi, soleiðis at barnið kennir/veit, at hetta er ikki so illa meint. At arga er tískil ikki so óreint og áhaldandi sum at happa.

## Tað gráa økið millum arging og happing

Eitt stórt grátt øki er ímillum tað at arga og at happa. Um ein eigur at taka "kampin" upp, tá ið onkur verður argaður, veldst um, hvussu tann, ið verður argaður, kennir tað. Onkur børn leggja onki í, um tey verða argað, onnur kunnu gerast djúpt ólukkulig.
Tey, ið arga, siga ofta, at tað var bara til stuttleika, sjálvt um tey síggja, at tann, ið argaður verður, als ikki heldur, at tað er stuttligt.
Kanningar og royndir vísa eisini, at happing byrjar sum ágangandi arging. Um tosað verður við barnið/tann unga um argingina, er møguligt at finna út av, um tað er neyðugt at "grípa inn" og steðga argingini.
Ein góð tummilfingraregla er at taka støði í sær sjálvum og spyrja næmingin: "Um onkur segði soleiðis við teg, hevði tú blivið ill/ur ella kedd/ur? - og hevði tú viljað, at onkur steðgaði hesum?"
Endamálið er at vísa barninum/tí unga, at tað er í lagi at siga frá, tá ið onkur argar, og um barnið ynskir tað, so er her eitt vaksið fólk, sum er til reiðar at hjálpa.

## Hvørji eru við?

### Tey, ið verða happað, tey, ið happað, eltibløðrurnar og tigandi meirlutin

Býtið í einum typiskum happitilburði er ofta hesin:

- 1 – 3 næmingar, sum verða happaðir – ofta stigskipaðir. Er tann, sum verður mest happaður, ikki til staðar, er tað tann næsti í røðini, sum stendur fyri skotum. Júst hetta ger, at ein skúli loysir ikki trupulleikan við happing í einum flokki, við at flyta tann, ið happaður verður, í ein annan skúla – kanska fyri tann, sum verður happaður, men happarin fer næstan við vissu at finna sær onkran annan at happa.
- 1 – 3 næmingar, sum happa. Ein av hesum gongur á odda. Oddafiskurin løðir, og hinir skjóta, skilt á tann hátt, at teir gera, sum oddafiskurin sigur.
- Ein ella fleiri eltibløðrur. Eltibløðrur eru passivir happarar. Hvussu nógv, ið hesi eru, kann vera ógvuliga ymiskt – eisini frá støðu til støðu. Hesi kunnu teljast á einari hond, men allur flokkurin, kann eisini vera við. Mest vanliga er, at eltibløðrurnar eru 2-3 í tali.
- Tigandi meirlutin.

### Tey, ið verða happað

Granskarar hava staðfest at tað, ið eyðkennir børn, ið verða happað, er, at tey eru varin, kenslulig og still børn, sum eru bangin av sær og ótrygg í gerandisdegnum. Granskingin hevur í stóran mun fevnt um happing millum dreingir. Dreingir, ið verða happaðir, hava tað til felags, at teimum dámar ikki harðskap, og so eru hesir dreingir eisini ofta fysiskt veikari enn floksfelagarnir.

Tað, ið ger happingina skaðiliga, er, at tey, ið eru fyri áganginum, sum tíðin líður veruliga halda, at tey eru soleiðis, sum tey verða søgd at vera í gerandisdegnum, tvs. óynskt, miseydnað, ljót og býtt. Sjálvsvirðingin verður so niðurbrotin, at endin kann verða, at tey, ið happa, fáa rætt í tí tey siga, tí at tey, ið eru fyri áganginum, vilja blíva bangin, ótrygg og miseydnað, sum tíðin líður.
Ofta síggja vit, at tey, ið verða happað, siga tað ikki fyri nøkrum, í øllum førum ikki fyri lærarанum í skúlanum. Børnini eru bangin um, at tað bara gerst uppaftur verri, um tey slatra.
Sjálvt um kanningar vísa, at børn, ið verða happað, oftari siga frá heima enn í skúlanum, so er tað verri enn so, at foreldur altíð fáa tað at vita. Tey, ið verða happað, eru so flov av hesum, og av, at tey ikki megna at steðga happingini sjálv, at tey oftast lata vera við at tosa um tað. Um barnið sigur frá heima, leggur tað oftast afturat, at foreldrini skulu ikki siga tað fyri lærarанum.
Vónandi gera foreldrini tað kortini, so at skúlin kann steðga happingini.
Um skúlin hevur ein greiðar mannagongdir á økinum, og børnini sjálvandi hava fingið at vita, at skúlin góðtekur ikki happing, er stórur møguleiki fyri, at børnini tora at siga frá.

**Tey, ið happa**

Kanningar vísa, at tey, ið happa, hava positivari støðu til harðskap og ágongd enn miðalnæmingur hevur. Teir eru ágangandi í sínum verumáta, bæði fyri lærarum og foreldrum. Teir eru ofta ógvuliga dominerandi og hava eina góða og sterka sjálvskenslu.
Eins og tey, ið verða happað, og hava verið tað í áravís, um eingin vaksin grípur inn, vilja tey, ið happa, eisini um eingin vaksin grípur inn, happa í áravís – til stóran skaða fyri tey sjálv og tey, sum tey eru saman við.
Eingi børn skulu hava tann leiklutin at fremja negativar gerðir og forfylgja øðrum, uttan at onkur vaksin grípur inn. Tey vaksnu hava ábyrgdina av at læra børnini at vera saman á reiðiligan hátt, so øll trívast. Hava børnini ikki lært tað heima, noyðist skúlin at gera tað.
Íðin og avgjørd vaksin fólk læra tey, ið happa, hvussu man kann vera saman, uttan at onkur forpestar umhvørvið við negativum gerðum, at fara um mørkini hjá øðrum og at dominera onnur.
Tað er ógvuliga týdningamikið at skilja ímillum barnið og gerðirnar hjá barninum, so tað skilir, at tað er ikki barnið, sum er trupulleikin, men negativu gerðirnar, sum skulu broytast. Ikki fyrr enn happarin skilir, at lærarar og onnur vaksin eru saman við tí og vilja hjálpa tí við negativu gerðunum, hevur tað ein møguleika at sleppa úr óndu ringrásini. Hetta skal alt vera í samstarvi við foreldrini hjá happaranum, tí børn læra skjótari at halda avtalur, tá ið tey vaksnu, sum eru um tað í gerandisdegnum, eru samd og draga eina línu.

**Eltibløðrurnar**

Eltibløðrurnar, sum ikki eru tey, ið byrja ágangin, men sum elta happaran, eru passivir happarar.
Hesin bólkur er smb. kanning ógvuliga “sprøklutur”. Í hesum bólki eru ofta børn, ið eru ótrygg og bangin av sær, sum eru við, so at tey ikki sjálv gerast offur.
Um man tosar við hesi børnini einsamøll, siga tey ofta, at tey halda, at tað er synd í teimum, sum verða happað, men tey tora ikki at siga nakað við happaran, tí tey eru bangin fyri, at hesin so fer at happa tey ístaðin.
Uppgávan hjá heimunum og skúlanum er sostatt at hjálpa hesum børnum, soleiðis at tey gerast meira sjálvbjargin og tora at siga frá.

**Tigandi meirlutin**

Tigandi meirlutin í einum flokki eru tey børnini, sum ikki eru við í happingini, men eru vitni til, hvat fyriferst. Børn, sum hvønn dag síggja, hvussu tann, ið verður happaður, og onnur børn upp á skift verða niðurgjørd av happaranum og eltibløðrunum. Tey tora ikki at hjálpa teimum, sum standa fyri skotum, tí tey eru bangin fyri sjálv at gerast offur. Hetta, sjálvt um tey halda, at tað er synd í tí happaða.
Tigandi meirlutin, sum ikki er við í happingini, men er vitni til, hvat ið fyriferst, skal eisini læra at siga frá, so at tey framyvir kunnu fáa týdning fyri trivnaðin í flokkinum.

**Lærarin og flokkurin**

Vit kunnu hervið staðfesta, at tað kostar nógv, at lata happingina halda fram, bæði fyri tann, sum verður happaður, tann, ið happar, og tigandi meirlutan.
Í einum flokki, har happing fer fram, er ofta ein ótryggur og spentur stemningur. Børnini eru alla tíðina á vakt, og hetta ger, at tey ikki læra so væl. Børnini eiga at kenna seg trygg og ikki vera bangin fyri, at onkur ger tey til láturs. Happing í einum flokki førir ofta til stóran passivitet, tí børnini lata heldur vera við at taka lut í undirvísingini enn at risikera at verða tillátursgjørd.
Men happing hevur eisini ein høgan prís fyri læraran og fyri samanhaldið í flokkinum. Letur lærarin standa til og ikki steðgar happaranum, missa næmingarnir álitið á og virðingina fyri læraranum, og tískil missir hann eisini leiklutin sum natúrligi leiðarin. Tann, ið happar, er ofta ágangandi mótvegis lærarunum, og verður tað ikki steðgað, breiðir ótryggleikin seg í flokkinum. Undirvísingin kann verða oyðiløgd av happaranum, og tónin kann gerast niðurlátandi og háðandi, og hetta skapar ótryggleika.
Um "junglulógin" ikki skal verða galdandi er neyðugt, at lærarin átekur sær leiklutin sum leiðari. Lærarin vendir sær til leiðslu skúlans og hinar lærararnar í flokkinum fyri at fáa eitt samarbeiði í lag. Soleiðis vinnur lærarin álitið hjá børnunum – ***her er ein vaksin, ið ger okkurt við støðuna*** - . Tað er lærarin, sum støðugt heldur fast í teimum normum, sum eru galdandi fyri flokkin, og syrgir fyri, at reglur verða yvirhildnar, soleiðis at næmingarnir eru tryggir.
Tryggleiki er fortreytin fyri gott læruumhvørvi.

# Amboðskassin

## Soleiðis steðga vit happingini

Tá ið vit skulu steðga happing, hevur tað stóran týdning, at man hevur tíð til tað. Tann, ið skal ganga á odda, eigur í fyrsta umfari at fáa fýra samanhangandi dagar, at arbeiða við hesum.
(tvs. skemað verður niðurlagt)

Tann, ið gongur á odda, eigur at vera lærari ella leiðslufólk í skúlanum.

1. *Kunningar- og kanningartíðarskeiðið*
   *mánadag – mikudag: einstaklingasamrøður við børnini (tvey – trý børn um tíman)*

2. *Broytinartíðarskeiðið*
   *Hósdagur, allan dagin (foreldrafundur um kvøldið)*

3. *Framhaldið. Fríggjadagur: floksfundur, uml. 30 min.*

   *Næsta vikan: Stuttur floksfundur, uml. 20 min. hvønn dag í teimum yngru flokkunum. Í teimum eldru flokkunum: floksfundur tvær ferðir um vikuna, seinni bara ein floksfundur um vikuna.*